# Væleydnað føroyskt tiltak í



**Hundrað umboð fyri altjóða fíggjar- og oljuheimin og føroyskt vinnulív og myndugleikar hittust mikukvøldið í hjartanum av London. Til umrøðu var einki minni enn Føroya framtíð. Lagt verður av álvara upp til frá føroyskari síðu at faa útlendskar íleggjarar at visa Føroyum størri ans**

MENNINGARATAK
*Jan Müller*
*London*

Ikki færri enn 80 umboð fyri altjóða fíggjarheimin, fleri av heimsins storstu oljufeløgum og finanspressuna í Bretlandi vóru til staðar á føroysku sendistovuni í London, tá stóra kunningartiltakið um Føroyar sum framtíðar íløguland lat upp mikudagin. Eisini høvdu 25 umboð fyri føroyskt vinnulív, peningastovnarnar, íløgufeløg, oljufeløg og landsstýrið leitað sær til hin størsta fíggingardepilin í heiminum henda góða og møguliga søguliga várdag í mai 2005.

Har vóru framstandandi fólk frá kendum oljufeløgum sum Shell, BP, Chevron, ExxonMobile, Statoil og Amerada Hess. Tað var eisini bæði áhugavert og forvitnisligt at síggja ikki færri enn tvey umboð fyri danska oljufelagið Maersk Olie og Gas millum mongu gestirnar. Hetta felagið var í síni tíð við í fyri-reikingunum til oljuleiting við Føroyar. Kanska eitt tekin um, at stóra danska oljufelagið aftur er farið at venda eygunum norðureftir.

Har vóru so eisíni umboð fyri bæði tey føroysku oljufeløgini, sum hvør í sinum lagi royna at eggja útlendskum íleggjarum at gera íløgu í eina føroyska oljuframtíð.

Úr Føroyum vóru so eisíni oddafolkini í Føroya Banka, Føroya Sparikassa, Kaupthing Føroyar, Fiskavirking, Virðisbrævamarknaðinum, Notio, Framtaksgrunninum, felagnum Tjaldur, Beta fyri bert at nevna nøkur.

Ikki færri enn tvey landsstýrismálaráð vóru við fíggjarmálaráðharranum, Bárði Nielsen á odda. Aftrat honum vóru aðalstjórarnir Petur Alberg Lamhauge úr Fíggjarmálaráðnum og Arne Poulsen úr Vinnumálaráðnum við.

John Rajani, føroyski sendiharrin í London beyð gestunum vælkomnum. Síðani vóru tríggjar framløgur við Bárði Nielsen, landsstýrismanni, Sigurð í Jákupsstovu, stjóra á Oljufyrisitingini og at enda Graham Steward, stjóra í Føroya Kolvetni, ið eisíni sponsoreraði tiltakið.

Reyði tráðurin í øllum fyrilestrunum var tann eini og sami: Føroyar bjóða seg fram á altjóða kapitalmarknaðinum. Íleggjarar, bankar og aðrir fíggingarstovnar eiga at síggja grundini tók dynamiski og ágrýtni føroyski oljustjórin, sum starvast í Bretlandi og her roynir at skapa áhuga fyri Føroyum samanum og segði teimum 100 gestunum, at nú var tíðin komin at venda eyguni móti Atlantsmótinum og frá Norðsjónum. Tí tað er her við eitt nu Føroyar, at framtíðar oljan liggur goymd og bara bíðar eftir at vera uppdagað.

Eftir framløgurnar beyð tann sera fyrikomandi danski sendiharrin í London gestunum til lítla hugnaløtu í hølum sínum á sendistovuni, har ymsu gestirnir fingu høvi at tosa hvør við annan.





Føroyar, føroyskt vinnulív og føroyska rávøru, tað veri seg olju, fisk, KT og rætt og slætt menniskju sum eina skilagóða framtíðar íløgu.

Og við m. a. tí føroyska oljufelagnum Faroe Petroleum sum fyrimynd fyri, hvussu væl ber til at sannføra útlendskar íleggjarar um tað skilagóða í at gera íløgur í Føroyum, legði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum góðu kort síni á borðið: vit bjóða hervið altjóða íløgumarknaðinum at seta pengar sinar í komandi privatiseringar í Føroyum, í eitt nú ein stóran banka, eitt flogfelag, ein fiskiídndað osfr. Og eftir at stjórin í Oljufyrisitingini hevð greitt frá, hvussu stórir moguleikar eru fyri at finna olju og gass í føroysku undir-



